# Formil 1 fær ikki kappingarneyta

**Tey fimm liðini, ið enn ikki høvdu boðað frá luttøku í formil 1 kappingini eftir 2008, hava nú í felagstíðindaskrivi boða frá, at tey hava meldað seg til**

FORMIL 1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

BMW Sauber, Honda, McLaren, Renault og Toyota siga í tíðindaskrivi frá, at liðini hava søkt um luttøku í formil 1 koyringini fyri kappingarárið 2008. Áður hava formil 1 liðini verið so ónøgd við samstarvið við FIA, at tey ætlaðu at stovna sína egnu kappkoyring í staðin fyri formil 1. Men alt fleiri lið hava slept hesum ætlanum, og nú tykjast tey seinastu fimm liðini eisini at hava avgjørt at verða verandi.

**Stórar broytingar**

Í seinastu viku kunngjørdi felagskapurin aftan fyri formil 1, FIA reglugerðina fyri formil 1 í árini 2008-10, og boðaði frá, at freistin at boða frá luttøku verður nú fríggjadagin. Nýggja reglugerðin hevur sera umfatandi broytingar við sær. M.a. hesar:

Menningin av motorum verður steðga. Liðini skulu brúka sama snið av motori í trý kappingarár.

Sniðið skal verða latið FIA í juni í ár.

Gearkassar skulu halda í fýra koyringar.

Verður motorur ella gearkassi skiftur út áðrenn tíð, verða 15 kg av barlast løgd í bilin.

Ein dekkframleiðari veitir dekk til øll liðini.

Royndarkoyringin verður avmarkað til 30.000 kilometrar um árið.

Luttakargjaldið verður beint yvir tvær milliónir kr. Í mun til núverandi trygd á kr. 300 milliónir

Kappingarárið verður longt til at kunna umfata 20 koyringar í mun til 19 nú.

**Renault má luttaka**

Tey fimm formil 1 liðini siga, at tey nú gleða seg til at fara undir samráðingar við FIA um nýggju reglugerðina.

Leingi hava leysasøgur gingið um, at Renault fór at gevast í formil1 eftir hetta ella komandi kappingarár. Men hóast tilmeldingina til formil 1 2008, so sigur hetta einki um ætlanirnar hjá liðnum. Tí um Renault gevst, verður liðið ivaleyst ikki niðurlagt, men heldur selt. Tí er ein tilmelding neyðug fyri at liðið ikki skal missa alt søluvirðið.



STEPHANSSONS HÚS

## Navnið spillir ongan

"og kært barn har mange navne". Bókasølan og Griffilin hava gjørt av at kasta saman. Nýggi handilin kemur at verða út til torgið í SMS og verður munandi størri enn núverandi handlar eru tilsamans í dag. Fleiri bøkur og meira pappír, men ikki so nógvar leikur sum nú. Vit fara at leggja doyðin á at veita eina professionella tænastu, men eisini gera handilin til eitt stuttligt stað, har tú dettur um tað óvæntaða.
Nú leita vit eftir einum hóskandi navni til handilin, og tí bjóða vit til eina navnakapping.

## Vinn 4838,- kr.

Send okkum títt uppskot um hvussu tú heldur, at handilin skal eita. Um vit brúka navnið, vinnur tú 4838,- kr. Eru tað fleiri sum senda sama uppskotið inn, kasta vit lut um hvør fær vinningin. Uppskotini skulu vera okkum í hendi 1. apríl 2006. Brævbjálvin skal stílast til Griffilin, postboks 1158, 110 Tórshavn.

# Tromsø taptu fyrstu finaluna

Sunnudagin spældi norska BK Tromsø fyrstu finaluna um norska meistaraheitið í mansflogbólti.

Á liðnum hjá Tromsø vóru aftur hesa ferð Bárður B. Mikkelsen og Rúni Weihe, men heldur ikki teir báðir fingu gjørt so nógv hendan dystin.

Úr Noreg sigur Bárður, at tey bæði fyrstu settini gekk av skriðuni hjá Tromsø, sum snøgt sagt ikki fekk gjørt nakað rætt.

Seinni batnaði spælið tó nakað, og teir vunnu triða settið, men tað var ikki nóg mikið kortini. Við settúrslitunum 23-25, 10-25, 15-16 og 22-25 taptu føroyingarnir fyrsta dystin.

Sum skilst, so er eisini óvist, hvussu liðið hjá Tromsø verður mannað til næsta finaludystin. Til dystin móti Kristianssun hesaferð, mátti Tromsø verða eina spælara fyriuttan, meðan mótstøðan manglaði tveir spælarar. Í øllum trimum førum var beach-volley í Brasil atvold til fráveruna.

Hartil hevur Rúni Weihe barnadóp á skránni, nú næsta finalan nærkast, og tí er óvist, hvørt hann verður tøkur hjá liðnum, tá finalan verður spæld 8. apríl.

**-mørk**

# Tríggir KÍ'arar afturat til LÍF

Klaksvíkingar eru rættiliga farnir at trívast hinumegin Leirvíksfjørð. Fleiri spælarar eru farnir til LÍF, ÍF og GÍ at spæla, og fríggjakvøldið mannaði Ítróttar-Sosialurin eitt sterkt lið við klaksvíkingum, sum spæla fótbólt aðrastaðni enn í Klaksvík. Hetta lið hevur fingið styrk um vikuskiftið, tí undan dystunum leygardagin fluttu tríggir klaksvíkingar afturat til Leirvíkar spæla fótbólt. Talan er um spælarar, sum hava verið profilar í KÍ nógvu seinnu árini. Brøðurnir Jan og Allan Joensen hava verið stuðulsspælarar hjá KÍ síðani fyrst í 90'unum, og Erling Fles hevur gjørt nógv mál fyri felagið seinnu árini. Teir tríggir spæla nú í grønu troyggjuni hjá LÍF.

**-mørk**

# Rokna við heiðursmerkjum

Leiðslan í norska felagnum Start hevur gott mót til landskappingina í ár, hóast tað hevur gingið illa hjá felagnum seinastu vikurnar. Venjingardystirnir og dystirnir í Royal League hava ikki spælt av, sum Start kundi ynskt sær, og skaðar, sjúka og aðrir trupulleikar hava eisini verið í hópinum, har Todi Jónsson er ein av spælarunum. Men leiðslan í felagnum hevur ikki mist mótið av hesum.

Stjórarnir Erik Solér og Ernst Ravnaas halda, at Start fer at vinna heiðursmerki aftur í ár, hóast útlitini ikki eru tey bestu.

– Vit hava eina góða útgangsstøðu, og vit fara at hava eitt sera gott kappingarár, heldur Erik Soler.

– Truplar tíðir styrkja teg. Hetta hava vit upplivað sum leiðsla, og tað fara spælararnir eisini at upplivað í ár, sigur Ravnaas við Fedrelandsvennen.

**-ek**

# FCK og Lillestrøm hittast

Finalan í Royal League 2006 fer at standa ímillum danska felagið FC Keypmannahavn og norska Lillestrøm. Hetta er greitt, eftir at seinnu hálvfinalurnar í kappingini eru spældar. FCK vann trygt á FC Midjyllandi í hálvfinaluni, og Lillestrøm sigaði somuleiðis greitt á Djurgården.

FCK vann í fjør fyrstu Royal League kappingina, og felagið hevur tí møguleikan at endurvinna norðurlendska gullið.

**-ek**